# Ítrótturin 2003




**juli:** Fyri fyrstu ferð verður almenn marathon-renning fyriskipað í Føroyum Cecil Weihe rennur teinin í 2.55,54, og gerst við hesum fyrsti vinnarin av Tórshavn Marathon, sum eftir ætlan skal verða afturvendandi kapping.



**juli:** Í kapping í Kanada setir Heidi Andreasen ikki færri enn trý heimsmet, og vinnur gull í øllum fimm kappingunum, sum hon stillar upp í.

**juli:** Ólavsøkan er av, og so eru meistararnir funnir. Drekin vinnur hjá gentunum og Sílið hjá dreingjum, har Havfrúgvin tó tekur ólavsøkusigurin. Kvinnuróðurin vinnur Jarnbardur, men har verður Gongurólvur meistari og í 6-mannaførum hjá monnum vinnur Smyril alt. Ørvur hevði undan ólavsøkuni vunnið allar FM-róðrarnar, men teir máttu lúta fyri Kvívíkingi á heimasjógvi. Tíggjumannafarsróðurin vann Nólsoyingurin fyri fyrstu ferð síðani 1989, men Eysturoyingur gjørdist tó føroyameistari.






**juli:** Umdystur skal til, men við einum 3-1 sigri eydnast B36 at enda at basa GÍ og harvið gerast steypavinnari. GÍ var annars á odda í hálvleikinum, men eftir at Bartal Eliasen varð rikin av vølli, tóktist tað bara ganga ein vegin.



**juli:** KÍ kvinnurnar vóru stórfavorittar, men tær máttu stríðast sera hart, áðrenn tað enda eydnaðist at basa HB í steypafinaluni. Dysturin endaði við 2-1 sigri til KÍ, sum sostatt tykist hava beina kós móti greipuni.



Ítrótturin 2003



**august:** Todi Jónsson og FCK eru næstan í dreymalandi, tá Todi Jónsson javnar til 1-1 í undankappingar dystinum móti Glasgow Rangers. Góða úrslitið á útivølli er tó ikki nóg mikið, tí í Parkini vinnur Glasgow 2-1, og so er dreymurin av á hesum sinni.

**august:** Henrik Larsen og Fótbóltssambandið skriva undir nýggjan sáttmála. Hesin inniber, at Stóri eisini verður landsliðsvenjari til komandi HM-undankappingina. Samstundis verður eisini gjørt av, at Jógvan Martin Olsen heldur fram sum hjálparvenjari hjá landsliðnum.



**august:** Føroyska Europa-Cup luttøkan í fótbólti er av á hesum sinni, og hesaferð spurdist einki stig burturúr. Fyri meistaralið mátti HB lúta fyri litaviska FBK Kaunas. Í UEFA Cup kappingini hittu KÍ og NSÍ ávíkavist Molde og Lyn, sum bæði vóru úr Noreg, og í InterToto kappingini mátti GÍ lúta fyri moldaviska FC Dacia. Hetta er annars fyrsta ferðin, at NSÍ kappast í europeiskum høpi.





**august:** Martin Simonsen verður føroyameistari í Tennis. Kappingin varð upprunaliga leikt í juli, men tá vann ein danskur leikari kappingina, so nýggj kapping mátti ásetast fyri at finna føroyameistaran.

**august:** Rógvi Jacobsen javnar enn einaferð til 1-1, men enn einaferð mugu Føroyar lúta 2-1 fyri grannunum úr Íslandi. Talan var annars um kanska besta landsdystin hjá okkum í ár, men tvey mistøk í verjuni kosta tó møguleikan fyri stigum.






**august:** Bert 11 tóku lut, tá FM í frælsum ítrótti varð fyriskipað á Svangaskarði. Mest vinnandi íðkarin er Evald við Garð, sum vinnur trý gullmerki